*Føroya Handverksmeistarafelag uppí málið um undirsjóvartunnilin:*

# Noktar byggifeløgum at arbeiða upp á Vágatunnilin

*Arbeiðið er gera tunnilin undir Vestmannasundi er fyribils lagt lamið, tí Føroya Handverksmeistarafelag sigur, at mannagongdin er greitt lógarbrot*

ÁKI BERTHOLDSEN

Alt arbeiðið uppá at gera tunnilin undir Vestmannasundi eru er nú lagt lamið.

Tað er Føroya Handverksmeistarafelag, sum ikki vil góðtaka framferðina hjá nevndini fyri P/F Vágatunnilin.

Og tí hevur Meistarafelagið noktað øllum limum sínum at taka samráðingar upp við nevndina í P/F Vágatunlinum um arbeiði í sambandi við tunnilin.

–Tað, sum er farið fram er heilt greitt brot á lógina og tað kunnu vit ikki lata um okkum ganga, sigur Sven Roest, næstformaður í Føroya Handverksmeistarafelag.

Tað, sum hann sipar til, er framferðin í sambandi við vegagerðina til og frá tunlinum, bæði Streymoyarmegin og Vágamegin.

Arbeiðið varð boðið út í innbodnari lisitatión.

Men hóast Byggitek hevði lægsta tilboðið, hevur nevndin í P/F Vágatunlinum tikið samráðingar upp við J&K Petersen um at gera arbeiðið.

Hetta hevur sent ein skelk ígjøgnum alla byggivinnuna, tí tá ið talan er um innbodna lisitatión, kemur tað ikki fyri, at byggiharrin ikki tekur av tí lægsta tilboðnum.

Tá ið talan er um innbodna lisitatión eru tey, sum verða boðin at bjóða, frammanundan góðtikin at vera før fyri at útinna arbeiðið á fullgóðan hátt og tí stendur í lisitatiónslógini, at takast skal av tí lægsta tilboðnum.

Men at nevndin fyri P/F Vágatunnilin kortini í hesum førum hevur vrakað tað lægsta tilboðið, hevur fingið alla byggivinnuna at stúrsa við.



*Líkt er til, at framferðin hjá nevndini í P/F Vágatunlinum, fer at føra til fleiri endurgjaldskrøv. Somuleiðis hevur Føroya Handverksmeistarafelag gjørt av at nokta øllum limum sínum at samráðast við Vágatunnilin um arbeiði í sambandi við Undirsjóvartunnilin. Sostatt er arbeiðið í veruleikanum lagt lamið fyribils*

### Boykotta tunnilin

Nú er eisini tað hent, at Føroya Handverksmeistarafelag er komið upp í málið.

Og fyribils hevur Meistarafelagið gjørt av at nokta øllum limum sínum at samráðast við P/F Vágatunnilin um arbeiðið í sambandi við undirsjóvartunnilin.

Sostatt er arbeiðið í veruleikanum lagt lamið fyribils.

Vit hava fingið fatur á Sven Roest, næstformanni í Føroya Handverksmeistarafelag, og hann sigur, at tað er neyvan nøkur fordømi í øllum Evropa um, at ein byggiharri ikki tekur av tí lægsta tilboðnum, tá ið talan er um innbodna lisitatión.

Í teimum førum, har tað kortini er hent, hevur verið talan um stór endurgjaldskrøv.

Og hann væntar eisini, at talan verður um endurgjaldskrøv í hesum førinum.

Hann heldur, at tað er ógvuliga sannlíkt, at Byggitek fer at leggja endurgjaldskrav ímóti Vágatunlinum fyri at hava mist arbeiðið.

Hann væntar eisini, at Føroya Handverksmeistarafelag fer at stevna Vágatunlinum fyri at hava brotið lisitatiónslógina.

Tí har stendur, at í innbodnari lisitatión skal takast av tí lægsta tilboðnum. Tað stendur eisini, at tað eigur ikki at verða samráðst við næstlægsta tilboð fyrrenn samráðingar við lægsta tilboð eru endaðar úrslitaleysar.

Sven Roest væntar eisini, at Byggitek fer at leggja endurgjaldskrav ímóti Vágatunlinum fyri at hava spilt umdømið hjá byggifelagnum.

–At nevndin fyri Vágatunlinum ikki vil taka av tí lægsta tilboðnum frá Byggitek, kann ikki tulkast øðrvísi enn, at hon hevur ikki álit á byggifelagnum og tað kann verða oyðileggjandi fyri umdømið hjá tí, sigur Sven Roest.

– Vit skulu minnast til, at Byggitek ikki minni enn tvær ferðir er boðið at bjóða uppá arbeiðini.

– Fyrru ferð varð útbjóðingin afturkallað, tí Føroya Handverksmeistarafelag vildi hava útbjóðingartilfarið broytt.

Men aftur, tá ið arbeiðið varð boðið út aðru ferð, varð Byggitek boðið við.

Nevndin fyri P/F Vágatunnilin tilskilaði sær rætt til at velja og vrakað ímillum tilboðini.

Men næstformaðurin í meistarafelagnum sigur, at hetta er bara ein áseting, sum verður brúkt, um viðurskiftini hjá einum byggifelag broytast heilt munandi frá tí, at tað verður boðið uppí lisitatiónina, inntil tað verður gjørt av, hvør skal hava arbeiðið.

–Talan kann t.d. verða um, at byggifelagið fær eitt ovurhonds stórt endurgjaldskrav. Í slíkum førum kann byggiharrin í vissum førum rættvísgera at hann ikki tekur av tí lægsta tilboðnum, tí tað kann vera eitt sindur ótrygt at lata hetta ávísa felagið fáa arbeiðið.

– Men í hesum førum er ikki talan um nakað slíkt, tí nevndin fyri Vágatunlinum var fullgreið yvir fortreytirnar hjá Byggiek, táið teir vóru bodnir at bjóða og tær fortreytirnar eru einki broyttar síðani.

Sven Roest heldur eisini, at slík framferð eru eitt ómetaliga keðiligt signal at senda oljuvinnuni, sum vit vænta okkum so nógv av, tí í oljuvinnuni eru lisitatiónir dagligur kostur.

– Og hon krevur professionellari framferð, enn tað her er talan um, leggur Sven Roest afturat.

Hann sigur eisini, at tey felag, sum eru biðin at bjóða upp á sjálva boringina eru púra paff av tí, sum er hent.

Um tað fær nakrar avleiðingar fyri tey tilboðini, veit hann ikki.

– Men hetta kann fáa álvarsligar avleiðingar fyri føroyska byggivinnu, tí hetta er eitt dømi um, at tilboð verða ikki tikin í álvara, sigur næstformaðurin í Føroya Handverksmeistarafelag.

# Vegirnir til undirsjóvartunnilin: 2,4 milliónir á muni á tilboðunum

ÁKI BERTHOLDSEN

Tilboðið hjá Byggitek uppá vegirnar í sambandi við undirsjóvartunnilin, var 2,4 milliónir lægri enn tilboðið hjá J&K Petersen.

Sostatt var tað størri munur á teimum báðum tilboðunum, enn Klæmint Weihe, formaður í nevndini fyri P/F Vágatunlinum, greiddi frá í Útvarpinum leygarkvøldið.

Klæmint Weihe upplýsti fyri Útvarpinum, at tilboðið hjá Byggitek var bara 600.000 krónur lægri enn tað hjá J%K Petersen.

Og tað helt hann ikki vera so stóran mun, at ikki onnur viðurskifti kundu gera seg galdandi.

Tí eru tað viðurskifti av búskapartekniskum slag sum gera, at nevndin í P/F Vágatunlinum hevur gjørt av at samráðast við J&K Petersen, sum hevði næstlægsta tilboð, segði Klæmint Weihe fyri útvarpinum.

Men hann vildi ikki útgreina, hvørji viðurskifti, talan var um.

### 2,4 milliónir

Tey, sum hava skil fyri byggivinnu, skilja ikki, hvussu Klæmint Weihe fær tað til, at munurin ímillum lægsta tilboð hjá Byggitek og næstlægsta tilboð hjá J&K Petersen bara er 600.000 krónur.

Vit hava fingið fatur á tilboðunum og tað yvirlitið vísir, at tilboðið hjá Byggitek er 2,4 milliónir lægri enn tað hjá J%K Petersen.

Tilsamans var tilboðið hjá Byggitek 21,9 milliónir og tað hjá J&K Petersen var upp á 24,3 milliónir.

Arbeiðið varð boðið út í trimum arbeiðstøkum, men Byggitek var bíligari í øllum trimum tilboðunum.

Tey bæði bygifeløgini góvu eisini alternativ tilboð upp á arbeiðini, men eisini her var Byggitek bíligari.

Tað alternativa tilboðið hjá Byggitek var uppá 21,7 milliónir og tað hjá J&K Petersen var uppá 23,3 milliónir.

Sostatt var tað alternativa tilboðið hjá byggitek 1,6 millión lægri enn tað alternativa tilboðið hjá J&K Petersen.

At Klæmint Weihe fær tað til, at tilboðið hjá J&K Petersen bara er 600.000 hægri enn tað hjá Byggitek, kann bara merkja eitt av tveimum, siga byggikøn.

– Antin hevur J&K Petersen sligið av tilboðnum, ella er okkurt arbeiðið tikið burturúr. Men eisini hetta er brot á lisitatiónslógina, tí eftir henni kann byggiharrin ikki samráðast við næstlægsta tilboðið um prís, fyrrenn samráðingar við lægsta tilboð eru endaðar úrslitaleysar.

Tilsaman lótu sjey byggifelag tilboð uppá tey trý arbeiðini, men hini tilboðini vóru dýrari. Okkurt av byggifeløgunum gav bara tilboð uppá eina av teimum trimum arbeiðstøkunum.



# Øll húski í Svínoy fáa fast internetsamband

*Vinnumálastýrið ætlar at fáa eina ábending um, hvørt tað ber til at nýta kunningartøkni sum amboð til tess at skapa trivnað og virksemi á eini útoyggj í Føroyum*

EIRIKUR LINDENSKOV

Sunnudagin fóru seks tøkningar frá teldufyritøkuni Farodane til Svínoyar við antennum, sendarum o. ø., sum skal til at útvega øllum húsunum í bygdini fast internetsamband.

Talan er um eina verkætlan hjá Vinnumálastýrinum, sum er liður í ætlanin at menna Føroyar sum kunningarsamfelag. Á henda hátt ætlar Vinnumálastýrið at fáa eina ábending um, hvørt tað ber til at nýta kunningartøkni sum amboð til tess at skapa trivnað og virksemi á eini útoyggj í Føroyum.

Sum eina serstaka royndarverkætlan ella KT-pilotverkætlan, hevur Vinnumálastýrið saman við Svínoyar Kommunu tikið stig til at fremja verkætlanina, sum verður nevnd »Tykissamfelag - Svínoy«. Ætlanin er at leggja eitt fjarskiftiskervi millum húsini í Svínoy - eitt intranet - sum síðani hevur eina felags íbinding í internetið.

Húsini í Svínoy verða knýtt saman á einum føstum tráðleysum 11 Mb/s internetsambandi. Netið hevur eitt felags fast samband til internetið við einum upp á 1 Mb/s. Øll ferðslan á intranetinum er ókeypis. Tá farið verður út um intranetið, skal hvør einstakur gjalda fyri sína egnu nýtslu og er hóskandi avrokningarskipanin sett upp í skipanini, sigur Hjørdis Gaard úr Vinnumálastýrinum.



*Allir svínoyingar fáa nú møguleikan at rógva út á internetið*

Umframt hetta er eisini møguleiki at tosa í telefon um intranetið, sokallað IP-telefoni. Fyrimunirnir við IP-telefoni er, at nýtslan er ókeypis. Eisini eru møguleikar á netinum at senda nærvarp og t. d. at heinta myndatilfar og filmar úr einari felags goymslu.

– Tann besta langtíðaravleiðingin í Svínoy vildi verið, at oyggin gjørdist eitt veruligt tykissamfelag og partur av alheims tykissamfelagnum, har vinna og fólk nýta endaleysu møguleikarnar til at menna vinnu, mentan, útbúgving og harvið trivnaðin, sigur Hjørdis Gaard úr Vinnumálastýrinum í tíðindaskrivi.

Í Svínoy eru 30 húski við tilsamans 60 fólkum. Harafturat eru umleið 20 hús, ið verða nýtt part av árinum. Vinna og virksemi í Svínoy er smoltvirki, posthús, handil, bøndur, sjómenn og nakað av útróðri. Um summarið verður skúlin nýttur sum vallaraheim. Í oynni er ein smoltstøð. Tveir bøndur eru, sum liva av jarðarbrúki burturav.

Tveir Svínoyingar verða sokallaðir netumsitarar . Netumsitararnir luttaka saman við netteknikarum í uppsetingini og installeringini av útgerðini og fáa harvið neyðugar praktiskar royndir. Eftirfylgjandi fáa netumsitararnir neyðug skeið. Afturat er skipanin útgjørd til fjarveiting av tænastum t. v. s., at teldufyritøkan kann yvirvakja skipanina og veita neyðugu atstøðuna.

Ein KT-pilotverkætlan merkir, at vit royna nakað í verki, sum ikki er roynt áður. Málið er, at aðrar bygdir ella grannaløg nýta skipanina sum grundarlag og geva íblástur til líknandi framtøk aðrastaðni til at menna tílík bygda- og býlinganet.

Verkætlanin er at meta sum ein royndarverkætlan, ið skal geva nakrar royndir við atliti at Føroyum sum netsamfelag og sum partur av alheims tykissamfelagnum.

Menningin, sum fer fram innan kunningartøkni, fer væntandi at fáa eins stóran týdning fyri samfelagið í 21. øld sum ravmagnið hevði í 20.øld. Føroyska samfelagið - fólk í bygd og bý, virkir, feløg og stovnar - eru í dag í fullari ferð við at verða knýtt saman á internetinum. Internetið er ótengdt at frástøðu Føroya og gevur føroyingum eins møguleikar til at samskifta, samstarva og útvega sær vitan á alheims »elektróniska motorvegnum«, sigur Hjørdis Gaard úr Vinnumálastýrinum.



*Smáttan hjá Skótafylki Sigmunds Brestissonar við Leynavatn fekk stóran skaða av eldi um vikuskiftið*

# Eldur í skótahúsinum

EDVARD JOENSEN

Skótasmáttan við Leynavatn fór so illa av eldi um vikuskiftið, at hon má takast niður. Smáttan var ikki tryggjað.

Árliga Leynavatnsstevnan var leygardagin. Vanligt er, at skótar og ríðingafólk skipa fyri. Men í ár var stevnan broytt, og skótarnir vóru ikki við. Hetta var fyrsta árið, skótarnir ikki hava luttikið á Leynavatnsstevnuni.

Limir í Føroya Ríðingafelag fóru fríggjakvøldið, sum vanligt er, við rossum og tjøldum á stevnustaðið við Leynavatn. Tjaldað varð við vatnið, og rossini fingu høvi at hvíla fyri kappríðingina, sum skuldi verða leygarkvøldið.

Men onkur var, sum ikki hevði tjald við. Nakrir av hesum hildu til í skótasmáttuni, sum vanliga hevur staðið opin. At hon stóð opin, komst av, sigur Jógvan í Dali, kassameistari hjá gulu skótunum í Havn, at herverk ofta varð framt móti smáttuni. Brotnir rútar og tílíkt. Tað batnaði, tá smáttan var latin óstongd.

Her hava so fólk verið inni og hava kynt við tí olju, sum inni var. Tá oljan var uppi, varð roynt við føstum brenni, sum grillkoli og timbri. Men tað kláraði ovnurin ikki, og allur norðari endin er brendur úr húsinum.

Skaðin er hendur tíðliga sunnumorgunin, meðan fólk var í húsinum. Boðað varð frá, og sløkkiliðini úr Kvívík, Kollafirði og úr Havn komu á staðið. Tað tók tveir tímar at sløkkja.

Smáttan var ikki tryggjað, so tað er ein ordiligur smeitur fyri skótafylkið, nú hon er brunnin. Kassameistarin hjá skótunum veit ikki at siga í løtuni, hvussu verður við endurgjaldskravi. Hóast tað vóru limir í Føroya Ríðingafelag, sum vóru í húsinum, tá tað brann, verður helst ringt at ábyrgda felagið fyri skaðan. Um endurgjaldskrav verður reist, verður tað helst persónligt krav móti monnunum, sum vóru í húsinum, tá eldur kom í. Men hetta er mál, sum juristar mugu gera av, sigur Jógvan í Dali, kassameistari hjá Skótafylki Sigmunds Brestissonar.


